

# Nú er siglandi norðanfyri Kanada

Nú er siglandi norðanfyri Kanada, úr Baffinsflógvanum eystur móti Alaska og haðani suður í Kyrrahavið. Men siglingarleiðin kann vera vandamikil, tí enn eru nógv ísfjøll á leiðini. Kanadisku ís-mynduleikarnir siga, at um ein mánað ella so verður ísfrítt á allari siglingarleiðini, skrivar Jóanis ,Nielsen á heimasíðu sínari, við tilvísing til KNR. Sambært ís-mynduleikunum í USA er munandi minni ísur í ár enn undanfarin ár. Teir siga, at ísurin tiðnar, til einaferð í oktober.

# Elmar Rubeksen heimsmeistari í egning

**Elmar Rubeksen úr Hvannasundi vann leygardagin fyrst bæði føroyameistarakappingina og heimsmeistarakappingina**

SJÓMANNADAGUR

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Stangabrúgvin var full av fólki, tá ið egnikappingin fór í gongd í dag. Veðrið var gott, og fólk vóru spent at vita, hvør nýggi føroyameistarin fór at verða, og um hesin fór at megna at vinna á norsku og íslendsku gestunum.

Fólk heppaðu óført, og menninir kyttu seg. Kappingin var í tveimum umførum, og vinnarin gjørdist Elmar Rubeksen úr Hvannasundi. Ólavur Jacobsen úr Klaksvík, sum vann kappingina seinasta ár, gjørdist nummar tvey, og Jógvan á Lakjuni úr Klaksvík var nummar trý.

Fremstu tíðirnar í egnikappingini vóru hesar:
Elmar Rubeksen 8,21,61 min.
Ólavur Jacobsen 8,44,30
Jógvan á Lakjuni 8,45,26

## Hinar kappingarnar

Kappingina í Kjelving vann Kári Vitalis úr Klaksvík, norðmaðurin Kell Evensen vann føroyameistarkappingina í Agnskering, Bjørn Kallsoy vann bæði kappingina um at halda dregg og Sjómanstak.

Miriam og Kári Vitalis vunnu hespuvindingina við 5,00,22 minuttum.

Magnus Jákupson vann svimjikappingina fyri dreingir undir 14 ár, meðan Kári á Høvdanum vann svimjikappingina fyri menn













